# Hesi kappast

**Leygarkvøldið byrjar største ballið í Svøríki. Hesin setningurin hevur verið at hoyrt úr svenska sjónvarpinum nú í fleiri vikur. Og soleiðis er tað her í Svøríki - fólk elska Grand Prix, og tá undankappingar og stóra finalan eru á skránni, er næstan fólkatómt á gøtunum**

## Grand Prix



Inna Tørnroos
innna@sosialurin.fo

Níggjunda februar klokkan 19 føroyska tíð byrjar so ballið - svenska Grand Prixið. Og tey, sum standa á pallinum hetta fyrsta kvøld, eru ikki at spæla við. Kappingin er hørð, og tað eru bara tvey av teimum átta, ið beinleiðis fara víðari til finaluna.
Tey, sum koma á triðja og fjórða pláss, fáa ein møguleika aftrat, at koma til undankappingina "Andra chansen". Har kappast nummar trý og fýra frá øllum undankappingunum um tvey pláss aftrat til stóru finaluna í Globen 15 mars.
Kanska eitt sindur torført at skilja, men her í Svøríki duga vit Grand Prix reglarnir líka væl sum at telja upp í trý.

### Torfør kapping

Brandur hevur sum sagt ikki fingið tey læ ttastu at kappast ímóti. Christer Sjøgren, ið vit kenna sum forsangarin í Vikingarna, er kendur og væ ldámdur, E-Type & The Poodles er ein samanblanding, ið teirra fjepparir óivað stemma uppá, og so lítla, fitta Amy

1

*E-type & the Poodles*

## Line Of Fire

"This Is The Way" og "Campione" eru tvey av kendastu løgnum hjá E-type ella Martin Eriksson, ið er hansara verðuliga navn. Hann er sera kendur her í Svøríki, og hetta er aðru ferð hann er við til Grand Prix. Hesuferð luttekur hann saman við bólkinum The Poddles, ið mest spæla harðan rocktónleik! Teir hava eisini luttikið einaferð fyrr. Sangurin, sum hesir fimm luttaka við er ein ræ ttur hardrocksangur.

2

*Face-84*

## Alla gamla x

Emma Karlsson, Josefine Hansson, Sofia Helgesson og Sara Carlsson eru tilsamans bólkurin Face-84. Allar eru 23 ár og ókendar higartil í Svøríki. Tær koma allar úr býnum Varberg, og hava spælt saman sidan 2000, undir navninum Easy Damn. Kendi tónleikarin Wille Crafoord hevur gjørt sangin, ið verður lýstur sum popputur við 60-ara íblástri.

3

*Velvet*

## Déjà vu

Velvet eitur eftir røttum Jenny Petersson og er frá Helsingborg. Hon hevur luttikið einaferð fyrr, 2006, í svenska Grand Prixinum. Hon er ikki serliga kend í Svøríki, men harafturímóti selur hon nógvar fløgur í útlandinum, til dømis Japan, Filippinunum og Fraklandi. Hetta lagið er eitt ræ ttuligt diskolag við einum niðurlag, sum fær tey flestu at vilja syngja við.

4

*Brandur*

## Lullaby

Fyri tvøradrongin Brand Enni er hetta størsta framførðslan higartil. Líka kendur sum hann er fyri okkum føroyingar, líka ókendur er hann her í Svøríki. Her verður hann bara kallaður fyri Brandur. Bløðini skriva at flestu stemmurnar kann Brandur nokk vænta at fáa frá ungum gentum. Sangurin hjá Brandi er eitt róligt popplag við jazz íblástri. Sangurin er um hví kærleikin kølnar.







